# Merkið ella einki í Reykjavík

**Ítrótturin hevur gingið undan og víst, at uttan føroyska Merkið vundið á stong, so eru føroyingar ikki við. Nú landsins myndugleikar lata sendistovu upp í Reykjavík, má tað verða undir føroyska Merkinum ella ongum. Alt annað er eitt stórt afturstig**

VIÐMERKING

*Heðin Mortensen*





*- Vit hvørki kunnu ella skulu fara til Íslands sum nakað annað enn teir føroyingar, vit eru. Verður tað ikki gjørt undir Merkinum, so er frægari heilt at sleppa tankanum um nakra sendistovu, tí so verður sendistovan ongantíð nakað veruligt umboð fyri Føroyar, heldur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn og forseti í Ítróttarsambandi Føroya*

Nú gongd er komin á ætlanirnar at lata upp føroyska sendistovu í Íslandi, sær ikki mætari út, enn at eitt nýtt flaggstríð er á gáttini. Í øllum førum hava fleiri givið til kennar, at tað hóskar sera illa, at vit fara úr Føroyum til Íslands at knýta sambond við útnorðurgrannar okkara undir donskum flaggi.

Ikki kann heldur sigast annað, enn at alt hetta tosið um føroyska sendistovu undir donskum flaggi í Reykjavík skurrar í oyrunum, tí slíkt tos er høpisleyst og gevur onga meining. Skulu vit hava eina føroyska sendistovu, so skal sjálvsagt føroyska Merkið verða vundið á stong – og einki annað!

Tað er harmiligt at hoyra, at talan skal verða um Dannebrog, tí tað er als ikki í tráð við tað samband, vit frammanundan hava við grannar okkara í Íslandi, at vit ætla at fáa teir at taka ímóti okkum »umvegis Danmark«. Tí tað er tað, um vit ikki koma sum føroyingar og undir føroyskum flaggi.

Tá tað ræður um nýtslu av føroyska Merkinum, hevur ítróttúrin gingið undan og víst, at uttan føroyska Merkið vundið á stong, so eru føroyingar ikki við. Líka aftur til 1939 eru ótald dømi um bæði norðurlendskar og alheims fundir, har tað var sjálvsagt, at føroyingar eina og aleina umboðaðu Føroyar undir føroyskum flaggi.

Ikki so fá eru dømini um, at vertir og fyrireikarar ikki hava givið hesum gætur, og tí hava vundið danska flaggið á stong, har føroyingar eru komnir, men at føroyingar tá hava sett sum treyt, at annaðhvørt verður fundast ella kappast undir føroyska Merkinum – ella als ikki!

Eisini hevur okkum í ítróttarhøpi staðið í boði at vera við í bæði olympiskum leikum og øðrum alheims kappingum undir donskum flaggi, men ongantíð hava føroyingar enn tikið av, men havna øllum tilboðum um at umboða Føroyar undir øðrum enn okkara egna flaggi.

Við árunum hava onnur fingið virðing fyri hesum, og tí er ikki vanligt longur, at føroyingar mugu tryggja sær hesi viðurskifti, áðrenn farið verður á fund ella í kapping. Her hevur ítróttúrin gingið undan og víst vegin, so tí er tað harmiligt og hugstoytt, skulu landsins myndugleikar nú velja aðra leið, sum liggur øllum føroyingum so fjar.

Hetta snýr seg ikki um ríkisfelagsskap ella ei, men um føroyska samleikan sum tjóð. At vit eru í ríkisfelagsskapi við danskarar, ger okkum ongantíð til danskarar fyri tað, og tí er eingin meining í, at vit nú skulu seta á stovn okkara egnu sendistovu í Íslandi sum annað enn føroyingar.

Hendir tað seg, at Dannebrog skal verða vundið á stong uttan fyri okkara sendistovu í Reykjavík, er tað ein háðan ímóti øllum teimum, sum millum ár og dag hava vart Merkið og føroyska rættin at virka undir tí og ongum øðrum. Og hvussu skulu íslendingar tá taka ímóti okkum sum føroyingar?

Vit hvørki kunnu ella skulu fara til Íslands sum nakað annað enn teir føroyingar, vit eru. Verður tað ikki gjørt undir Merkinum og ongum øðrum, so er frægari heilt at sleppa tankanum um nakra sendistovu. Uttan Merkið – og bara tað – verður hon ongantíð nakað veruligt umboð fyri Føroyar!

# Hartrópandi íslendskur konsul, ódugnaligt føroyskt sjónvarp

ROLF GUTTESEN



**Dagur og vika hevði týsdagin 27. februar eitt "innslag" við Poul Mohr, Íslandskonsul. Eg vil ikki kalla tað samrøðu, tí Poul Mohr fekk at kalla fría mikrofon í einar 10 minuttir, til at forklutra eitt mál, sum hevði fortjent betri viðgerð**

Útvarp, Sjónvarp og politikarar og onnur tosa um, at Føroyar skulu hava eina sendistovu í Reykjavík í Íslandi. Tað ljóðar sum tað skuldi verið so líka til og nærmast ein sjálvfylgja.

Men tað er tað bara ikki. Og enn er tað manglandi vitan og realitetssansur. sum forvirrar. Har aftrat sjálvandi við ískoyti av hugi hjá vissum fundamentalistiskum bólkum, at provokera har til ber, so tað góða sambandi millum londini í ríkisfelagsskapinum kann gerast mistonkiligt og helst skaðiligt fyri Føroyar.

## Umboð fyri íslendska lýðveldið?

Tað ljóðaði sum Poul Mohr útalaði seg sum umboð fyri íslendska statin, sum konsul. Men innihaldið í monologinum fyri opnari mikrofon, hildin av tigandi sjónvarpsmanni, var meira ein tilsvíning av ríkisfelagsskapinum. Repetitión av gomlum mytum og misskiljingum, sum føroyska sokallaða "sjálvstýrisrørslan" hevur verið í so dugnalig at jabba í tíð og úrtíð.

Sum inngang segði sjónvarpið nakað soleiðis:

***"Íslendska flaggið fer skjótt at veittra yvir Fútastovu. Men í Reykjavík kann føroyska flaggið ikki veittra yvir føroysku sendistovuni. Nei, har skal Dannebrog vindast á stong."***

Legg merki til at tað eru symbolini sum her eru í fokus, ikki sakin. Ikki nakað konkret innihald, men meira um litin á innpakningspappírinum.

## Málpurisman svínar málið til

Og enn einaferð hava heimagjørd ný-føroysk orð forvirrað. Tí hvat er ein sendistova??? Hatta er eitt elastikk-orð, sum er breitt brúkt. Um ambassadu, konsulat, lobbykontór ella agentur.

Føroyar eru IKKI í holt við at gera eina sendistovu (ambassadu) í Íslandi. Tí tað ber ikki til. Tað eru bert suverenir statir, sum kunnu hava ambassadur hvør hjá øðrum. Føroyar kunnu heldur ikki hava nakað konsulat í Íslandi, tí konsulatir umboða eisini suverenar statir.

Ísland fer tí heldur ikki at hava nakra ambassadu í Fútastovu. Tað hava teir í Keypmannahavn, har tað hoyrir heima. Men eitt generalkonsulat kann einhvør suverenur statur hava í øllum býum, sum nógv samband er við (ikki bert í ríkisstjórnarbýum, sum Keypmannahavn ella London). Tí er tað í lagi, at Ísland velur at gera gamla konsulatið í Havn um til eitt generalkonsulat, sum er eitt stig hægri.

## Hvør hevur fjalda dagsskrá?

Báðir aktørar, Sjónvarp og Poul Mohr, blanda tingini saman. Teir burdu vitað betri! Tí má vera mær loyvt at spyrja, um teir hava nakra fjalda dagsskrá? Hvat er meiningin? Ella er hatta bara vanlig (ella óvanlig) dummheit?

Poul Mohr og aðrir "tjóðskaparmenn" burdu verið fegnir um at Føroya Landsstýri kann brúka ta eksperitsu og alt tað praktiska, sum liggur í at fáa eina skrivstovu í samband við ambassaduna hjá Ríkisfelagsskapinum (Danmark).

Tí Føroyar kunnu, sambart Wienerkonventiónina (ikki skrivast Vinarkonventión, sum vissir málspillarar gjarna vilja) um diplomatiska umboðan, hvørki hava ambassadu, generalkonsulat ella konsulat í Íslandi ella aðrastaðni. Tú kanst vera nøgdur ella ónøgdur við støðuna, sum hon er - men soleiðis er veruleikin.

Tí misbrúkar Poul Mohr sína diplomatisku støðu sum íslendskur umboðsmaður, tá hann leggur á Danmark, og háðandi hvessir, at "teir vilja hava Danabrókina hangandi uppiyvir føroysku sendistovuni" Hatta kann ein diplomatur hvørki siga ella meina!

Og Sjónvarpið dugir ikki síni ting, tá teir kunnu siga sovorið svass, sum citerað er omanfyri! Og ikki eru førir fyri at seta bert ein einasta kritiskan spurning.

## Frítt spæl fyri grovheitum?

Eg skal at enda bert nevna eina grovheit, sum Poul Mohr sendi út í luftina hendan dagin, betri var tað ósagt:

***"Ísland er tað einasta land í verðini, sum virðir okkum sum tjóð."***

Hvat skal man siga til slíkt tokusnakk? Og enn einaferð er orðavalið misvísandi, tí meinar hann "tjóð" sum stat ella natión? Men Ísland man hava sínar interessur at fremja, tá teir senda so nógvar ráðharrar hendanvegin.

## Friðarligt samarbeiði millum tjóðir

Til dømis í statinum Stórabretlandi (United Kingdom) eru minst 3 tjóðir, skottar, walisar og eingilskmenn. Íbúgvarnir á Man, sum tosa manx, eru kanska eisini tjóð. Og teir í Ulster?

Í Suðurjylland búgva fólk, sum eru týskarar av nationalitet (tjóð). Og sunnan fyri markið búgva fólk, sum eru danskarar av nationalitet, men sum búgva í Bundesrepublik Deutschland. Í Belgia eru tvær tjóðir, Vallonar og Flamlendingar. Í flestu londum eru nógvar tjóðir saman, og í flestu førum er hetta problemfrítt, ja kanska beríkandi.

Men summastaðni kemur nationalisma og fundamentalisma uppí, og so koma problemini. Og so kann óbótaligur skaði henda.

So, um Poul Mohr kanska meinti, at íslendingar virða føroyingar/Føroyar sum suverenan stat, so má tað kallast óhóskandi uppílegging.